# Sekstan nýggj fólk á tingi

**Nú nýtt landsstýrið varð skipað í gjár, eru aftur stórar broytingar á tingi**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sjey av teimum átta landsstýrisfólkunum eru vald á ting - og sambært nýggju stýriskipanarlógini skulu tey leggja niður sæti á tingi, tá tey taka við einum landsstýrissessi.

Løgmaður og Hans Pauli Strøm søgdu sínar tingsessir frá sær leygardagin, tá tingið varð sett. Fyri teir á ting komu næstu fólkini á listanum hjá Javnaðarflokkinum, Andrias Petersen í Gøtu (270 atkvøður) og Eyðgunn Samuelsen í Klaksvík (256 atkvøður).

Á næsta tingfundi, sum verður fríggjadagin, fer Helena Dam á Neystabø at leggja tingsessin frá sær, og fyri hana kemur á ting triðji eykamaðurin hjá Javnaðarflokkinum, Mikkjal Sørensen í Porkeri (247 atkvøður).

Tjóðveldið fær eisini trý nýggj fólk á ting fyri Høgna Hoydal, Tórbjørn Jacobsen og Bjørt Samuelsen. Fyri tey koma á ting Páll á Reynatúgvu á Sandi (330 atkvøður), Heidi Petersen í Vestmanna (305 atkvøður) og Olga Biskopstø í Gøtu (255 atkvøður).

Tjóðveldið fær eisini ein nýggjan fólkatingslim, nú Høgni Hoydal fer í landsstýrið, og verður tað Annita á Fríðriksmørk, sum skal umboða Tjóðveldið á Fólkatingi. Men Annita skal í barnsburðarfarloyvi í næsta mánaði, og verður tað tískil Sjúrður Skaale, sum sleppur at royna seg á bonaðu gólvunum í Keypmannahavn. Sjúrður Skaale hevur fyrr starvast sum skrivari hjá Norðuratlantsbólkinum - so hann kennir til fólkatingsarbeiði.

Men Sjúrður verður valla so drúgvur á Christiansborg. Annita á Fríðriksmørk sigur, at hon fer í farloyvi tá hon skal eiga í mars, men hon ætlar sær at taka sæti aftur, tá Fólkatingið kemur saman í oktober.

Fólkatingið fer vanliga í summarfrí á grundlógardegnum 5. juni og kemur ikki saman aftur fyrr enn fyrsta týsdag í oktober. So Sjúrður Skaale fær bert tríggjar mánaðir í fólkatinginum.

Næstur á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum er nú Finnur Helmsdal (217 atkvøður). Honum unnist ikki fast sæti á tingi hesaferð, men boð verða uttan iva eftir honum. Tá Annita á Fríðriksmørk fer í barsil, fær Finnur Helmsdal fast sæti í løgtinginum, men tað verður helst bert fram til ólavsøku. Hesa tíðina verður so Olaf í Garði Joensen á Eiði (176 atkvøður) varafólk á tingi - og hann kemur uttan iva á ting, meðan Sjúrður Skaale er burtur í fólkatingsarbeiði.

Av tí at fjóðri landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldinum - óvæntað - ikki var úr tingmanningini, endaði Finnur Helmsdal uttan fyri tinggáttina hesaferð. Hansara leiklutur er at verða fyrsti eykamaður fyri øll tey átta tjóðveldisfólkini, sum nú sita á tingi, og tað fer uttan iva at geva honum nógvar tingdagar - serliga nú Føroyar eru eitt valdømi - og tí, at brúk verður fyri øllum teimum 17 atkvøðunum hjá samgonguni í flest øllum málum.

Næst Finni Helmsdal koma Olaf í Garði Joensen og Óluvá Klettskarð.


*Jacob Vestergaard, 870 atkvøður Fólkaflokkurin*


*Jørgen Niclasen, 617 atkvøður Fólkaflokkurin*


*Anfinn Kallsberg, 550 atkvøður Fólkaflokkurin*


*Annika Olsen, 520 atkvøður Fólkaflokkurin*


*Jákup Mikkelsen, 437 atkvøður Fólkaflokkurin*


*Jógvan á Lakjuni, 417 atkvøður Fólkaflokkurin*


*Poul Michelsen, 341 atkvøður Fólkaflokkurin*


*Magni Laksáfoss, 979 atkvøður Sambandsflokkurin*


*Kaj Leo Johannesen, 642 atkvøður Sambandsflokkurin*


*Bjørn Kalsø,557 atkvøður Sambandsflokkurin*


*Edmund Joensen, 469 atkvøður Sambandsflokkurin*


*Alfred Olsen, 417 atkvøður Sambandsflokkurin*


*Johan Dahl, 377 atkvøður Sambandsflokkurin*


*Rósa Samuelsen, 314 atkvøður Sambandsflokkurin*


*Gerhard Lognberg, 595 atkvøður Javnaðarflokkurin*


*John Johannessen, 287 atkvøður Javnaðarflokkurin*


*Katrin Dahl Jakobsen, 283 atkvøður Javnaðarflokkurin*


*Andreas Petersen, 270 atkvøður Javnaðarflokkurin*


*Eyðgunn Samuelsen, 256 atkvøður Javnaðarflokkurin*


*Mikkjal Sørensen, 247 atkvøður Javnaðarflokkurin*


*Kári á Rógvi, 572 atkøvður Sjálvstýrisflokkurin*


*Kári P. Højgaard, 292 atkvøður Sjálvstýrisflokkurin*


*Annita á Fríðriksmørk, 616 atkvøður Tjóðveldi*


*Bergtóra Høgnadóttir Joensen, 481 atkvøður Tjóðveldi*


*Sjúrður Skaale, 416 atkvøður Tjóðveldi*


*Heini O. Heinesen, 415 atkvøður Tjóðveldi*


*Hergeir Nielsen, 352 atkvøður Tjóðveldi*


*Páll á Reynatúgvu, 330 atkvøður Tjóðveldi*


*Heidi Petersen, 305 atvøður Tjóðveldi*


*Olga Biskopstø, 255 atkvøður Tjóðveldi*


*Bill Justinussen, 573 atkvøður Miðflokkurin*


*Jenis av Rana, 504 atkvøður Miðflokkurin*


*Nýggja landsstýrið: Karsten Hansen, Tjóðveldi, Tórbjørn Jacobsen, Tjóðveldi, Kristina Háfoss, Tjóðveldi, Høgni Hoydal, Tjóðveldi, Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Javnaðarflokkurin, Helena Dam á Neystabø, Javnaðarflokkurin, Bjørt Samuelsen, Tjóðveldi og Hans Pauli Strøm, Javnaðarflokkurin. Øll landsstýrisfólkini, uttan Kristian Háfoss, sum ikki stilladi upp til løgtingsvalið, eru vald í løgtingið - og skulu tí leggja tingsessirnar frá sær*


*Tordur Niclasen, 123 atkvøður, Miðflokkurin*